umhvørvisstovan

P/F Vestlax
Postboks 82
410 Kollafjørdur

Argir, hin 13. august 2008
Málnr.: US-41209-092/08/10
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: HH

# Umhvørvisgóðkenning

av Smoltstøðini hjá

P/F Vestlax, Viðareiði (S-21)

Henda umhvørvisgóðkenning av smoltstøðini hjá P/F Vestlax (S-21) á Viðareiði, matr. nr. 195b, er givin við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 14 mai 2008, og grein 1, stk. 4 og 4a, í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, seinni broytt í grein 5, nr.1 og 4 í kunngerð nr. 90 frá 28.september 2007 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna.

## 1 Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

## 2 Umsóknin

Umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, ið nú er vorðin partur av Umhvørvisstovuni, fekk hin 21. desember 2006 umsókn um umhvørvisgóðkenning av smoltstøðini hjá P/F Vestlax í Viðareiði.

Saman við umsóknini og seinni er móttikið loyvisbræv, flowdiagramm, martikkulkort, yvirlitskort og tekning av spillivatnsleiðing.

Tað móttikna tilfarið hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

## 3 Lýsing av virkseminum

Smoltstøðin er á martikkulnummar 195b í Viðareiðis kommunu. Eigari av smoltstøðini er P/F Vestlax í Kollafirði.

Smoltstøðin hevur loyvisbræv til at reka smoltstøð til aling av laksi og sílum. Útgerðin er eisini egnað til at framleiða onnur feskfiskasløg. Loyvið er galdandi til 09.12.08.

Rogn ella yngul verða keypt og ald til smolt, sum verða sett á sjógv, tá tey eru sjóbúgvin. Sum heild verður framleitt til egnar sjógvalistøðir hjá Vestlax. Framleiðsluorkan og –tíðin verða við hita og ljósi stýrd soleiðis, at fiskurin er sjóbúgvin, tá støðirnar á sjónum eru klárar til at taka ímóti smoltunum. Vatnið verður hitað við oljufýringum. Verða smoltini sett á sjógv, tá tey eru 160-200 gramm, megnar støðin við verandi kapasiteti í mesta lagi at framleiða umleið 220 tons um árið.

Vatnnýtslan er meiri enn 50 $m^3$/tíman, og tað verður bæði nýtt áar- og kelduvatn. Á veg inn á støðina verður vatnið reinsað við rislifiltri fyri at fáa møguligt køvievni (N) burtur, síðani verður vatnið reinsað í einum trumlupartikkulfilturi og at enda UV-viðgjørt. Vatnið verður resirkulerað, og hvørt kar hevur serstaka vatnreinsieind.

Ein lítil partur av karvatninum verður, saman við skarni, fóðurrestum og deyðum og veikum ynguli sogin, upp av botninum og gjøgnum eina partikkulfellu. Skarn og fóðurrestir verða skolaðir út við spillivatninum. Tað liggja fleiri leiðingar út av støðini, ið sum er ikki ganga oman á sjógv. Deyði fiskurin verður eftirhildin av einari rist í partikkulfelluni og verður dagliga tikin upp, taldur og skrásettur.

Tann deyði fiskurin verður beinanvegin koyrdur í ein tanga, har hann verður malin og ensileraður við mýrusýru og goymdur, til hann verður koyrdur til Salmon Proteins á Eiði, ið er góðkent til at taka ímóti og viðgera smittandi lívrunnið tilfar.

Øll fóðring verður skrásett, og førd inn í Farm Control, sum er eitt serligt telduforrit til slíkar upplýsingar. Soppur verður hildin niðri við salti, kloramin og formalin. Øll nýtsla av kloramin og formalin verður skrásett.

Umframt vanligt fóður, verður eisini glucanfóður brúkt, sum styrkir immunverjuna hjá fiskinum, serliga uppundir at fiskurin verður koppsettur og sjósettur.

# 4 Viðgerð

Umhvørvisstovan hevur, í sambandi við ásetanina av treytum í umhvørvisgóðkenningini, viðgjørt ávirkanina á umhvørvið frá smoltstøðum generelt. Serliga vóru tað viðurskifti í sambandi við spillivatn, sum blivu viðgjørd. Avgjørt varð ikki at seta markvirði á spillivatnsútlát orsakað av, at vatnið í stóran mun verður endurnýtt. Framleiðslan á smoltstøðum er avmarkað, og flestu smoltstøðirnar liggja við góðar resipientar. Hinvegin metir Umhvørvisstovan tað vera umráðandi, at alt spillivatn verður leitt á sjógv við góðum vatnskifti (sí eisini HS-málnr.: 200400371).

Óljóðið inni á støðini verður avmarkað við at flyta luftkompressarar útum og mest larmandi útgerðina inn í eina síðuhøll fyri seg, har fólkið ikki vanliga noyðist at uppihalda sær. Innandura óljóð verður tó ikki viðgjørt nærri her, men verður mátað og tálmað í samstarvi millum felag, starvsfólk og arbeiðseftirlit. Støðin liggur tó fyri seg sjálva langt frá nærmasta granna, og óljóð frá tólunum hoyrist bert sum eitt suð út í tún.

Annars metir Umhvørvisstovan tað ikki verða neyðugt at áseta aðrar treytir enn tær, sum blivu útarbeiddar í samráði við Føroya Havbúnaðarfelag.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð send felagnum, Viðareiðis kommunu, Landsverkið og Heilsufrøðiligu starvsstovuni til viðmerkingar. Eingin hevði nakra viðmerking til uppskotið.

# 5 Góðkennningartreytir

## 5.1 Innrætting og rakstur

5.1.1 Virkið skal rekast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.
5.1.2 Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga avmerkt.
5.1.3 Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt. Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]), og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til.
5.1.4 Virkið skal seta vatnmátara upp, sum mátar vatnnýtsluna hjá virkinum.
5.1.5 Rist skal vera á øllum smoltkørum, sum forðar fyri, at fiskur sleppur út við spillivatninum.
5.1.6 Miðast skal eftir at nýta evni og tilfar, ið hava minst møguligt árin á umhvørvið.
5.1.7 Fiskur frá smoltstøðum kann einans setast út á alistøðir, ið eru góðkendar til aling av fiski.
5.1.8 Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

## 5.2 Goymslur

5.2.1 Evni og tilfar, ið kunnu dálka, skulu goymast soleiðis, at einki útlát til umhvørvið kann fara fram. Goymslur skulu innrættast soleiðis, at møguligir lekar og spill kunnu haldast aftur.
5.2.2 Evni, ið eru á goymslu uttandura, skulu vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu av viðkomandi evni.

## 5.3 Óljóð, ristingar og ljós

5.3.1 Óljóð[2] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán – frí | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Ley | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán – frí | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Ley | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgidagar | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

5.3.2 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.
5.3.3 Virksemið skal ikki hava við sær ampar av óljóði, íroknað lág- ella háfrekvent óljóð, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampar verða av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.
5.3.4 Tyrluflutningur skal ikki hava við sær ampa, og kann einans fara fram gerandisdagar millum kl. 7.00 og 18.00.

[1] Best Available Techniques.
[2] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

## 5.4 Útleiðing til luft

5.4.1 Virksemi má ikki hava við sær ampar av royki, lukti ella dusti uttan fyri øki virkisins.
5.4.2 Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.
5.4.3 Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

## 5.5 Spillivatn

5.5.1 Alt spillivatn skal í mestan mun leiðast í eina lokaða rørleiðing og beinleiðis á sjógv við góðari útskifting. Munnin á spillivatnsleiðingini skal verða minst 1 metur undir hægstu fjøru.
5.5.2 Eingin sjónlig slóð skal verða eftir spillivatnsútlátið.
5.5.3 Sýnistøkubrunnur skal vera, ið ger tað møguligt at taka sýni av spillivatninum.
5.5.4 Sýnir skulu takast av spillivatninum eina ferð árliga. Sýnini skulu kannast fyri total-nitrogen og total-fosfor. Sýnini skulu takast um ta tíð, tá ið biomassin á smoltstøðini er av tí mesta
5.5.5 Umhvørvisstova kann krevja, at botnkanning verður gjørd við munnan til spillivatnsútlátið, um hetta verður mett at verða neyðugt.
5.5.6 Um úrslit av botnkanningunum vísa, at dálking fer fram, sum ikki er uttan týdning, kann Umhvørvisstovan seta krøv um bøtandi atgerðir.

## 5.6 Burturkast

5.6.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[3].
5.6.2 Burturkast skal goymast soleiðis, at tað ikki er til ampa.
5.6.3 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og skal skiljast sambært ásetingum móttakarans.

## 5.7 Óhapp

5.7.1 Har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.
5.7.2 Virkið skal hava mannagongdir til fyribyrging av dálkingaróhappum og til upprudding eftir møgulig óhapp.
5.7.3 Virkið skal, um neyðugt, hava útgerð til upprudding eftir møgulig dálkingaróhapp.
5.7.4 Henda dálkingaróhapp, ella um fiskur sleppur, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.
5.7.5 Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast til Umhvørvisstovuna. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni[4].

## 5.8 Innaneftirlit

5.8.1 Virkið skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.
5.8.2 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar í 5.3, um óljóð, ristingar og ljós, í 5.4, um útleiðing til luft, og í 5.5, um spillivatn, verða hildnar.
5.8.3 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

---

[3] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast, og kunngerð nr. 40 frá 09-04-1992, um lívrunnið burturkast frá alivinnuni, seinni broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.
[4] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

5.8.4 Sýnistøkur og kanningar skulu gerast av persóni ella felag, sum Umhvørvisstova kann góðtaka.
5.8.5 Sýnistøkur og kanningar skulu gjaldast av virkinum.

**5.9 Rakstrarskráseting**

5.9.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:
- Tal og vekt av framleiddum smolti.
- Sjúkuútbrot, nøgd og slag av heilivági og viðgerðartíðspunkt.
- Nøgd og slag av rávørum, hjálpirávørum og kemikalium. Databløð fyri øll kemikaliu skulu verða tøk.
- El- og oljunýtsla.
- Avhendaðar nøgdir av burturkasti við tilskilan av slagi, móttakara og dagfesting.
- Røkt av reinsiskipanum.
- Óhapp, sum hava havt útlát ella vanda fyri útláti við sær.
- Úrslit og eygleiðingar (checklistar) í sambandi við innaneftirlit.

5.9.2 Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi í 5 ár, og tær skulu vera til taks hjá Umhvørvisstovuni.
5.9.3 Virkið skal eftir umbøn frá Umhvørvisstovuni senda inn rakstrarskrásetingar, úrslit av mátingum o.a. í hóskandi uppseting.
5.9.4 Umhvørvisstovan kann krevja aðrar skrásetingar enn tær, ið eru nevndar undir 5.9.1.

# 6 Almennar treytir

Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir dálkingina, uttan nýggj góðkenning er givin.

Góðkenningin skal altíð vera tøk á virkinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.

Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni.

Umhvørvisstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig árin, ið ikki vóru kend, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

Aftan á fimm ár kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi góðkenning, tá ið tað er umhvørvisliga grundað.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við øðrum góðkenningum.

## 7 Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 14 mai 2008 kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við umhvørvismálum saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

Argir

13/08-2008

Heidi Hansen, málsviðgeri

**Avrit:**

Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Falkavegur 6, FO-100 Tórshavn
Viðareiðis kommuna, Eggjarvegur 4 FO-750 Viðareiði
Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postboks 78, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn
Náttúrufriðingarnevndin fyri Norðoyar sýslu, Postboks 37, FO-700 Klaksvík